Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Kristianna Winther Poulsen, løgtingskvinna

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Fastir kommunulæknar á ellis- og røktarheimum

Spurningar:

1. Hvat skal til fyri at fáa eina skipan við føstum kommunulæknum til búfólk á ellis- og røktarheimum?
2. Hvørjar fyrimunir og vansar sær landsstýriskvinnan við eini slíkari skipan?
3. Hvørjar forðingar eru fyri, at ein slík skipan kann verða sett í verk?
4. Er landsstýriskvinnan sinnað at arbeiða fyri at fáa eina slíka skipan setta í verk?

Viðmerkingar:
Ynski er um at fáa eina skipan við kommunulæknum, sum eru fast knýttir at ellis- og røktarheimunum, har kommunulæknin kemur regluliga út á heimini.

Í dag er skipanin tann, at hvørt búfólk sær hevur sín egna kommunulækna, og búfólkið fer til kommunulæknan, um tey eru før fyri tí.

Búfólk á ellis- og røktarheimum eru viðbrekin menniskju, hvørs heilsa er viknað. Neyðugt er við góðari og ómakaleysari atgongd til læknahjálp, og mett verður, at fyrimunir eru við, at sami lækni kemur regluliga til teirra á heimunum.

Vit vita úr øðrum londum, at skipanir við læknum, sum eru fast knýttir at ellis- og røktarheimum, fyribyrgja, at búfólk verða óneyðugt innløgd á sjúkrahús, og at talið á innlegginum minkar við útivið 30 prosentum.

Royndir frá røktarheimum í Danmark við føstum kommunulæknum vísa, at tað hevur jaliga ávirkan á heilsuna hjá búfólkunum, at sami lækni kemur regluliga á læknavitjan. Munandi færri innleggingar vóru av sjúkum, sum kunnu fyribyrgjast, og læknarnir mettu, at tað bleiv brúktur minni heilivágur á røktarheimunum.

Tað vísir seg, at um tað ikki ber til hjá kommunulæknanum at koma á eitt ávíst heim, tá tørvur er á læknavitjan, verða tey eldru ofta innløgd, hóast hetta kundi verið fyribyrgt.

Fleiri dømi eru um, at starvsfólk á ellis- og røktarheimum brúka nógva orku fyri at fáa fatur á ymsu kommunulæknunum fyri búfólkið, umframt at tað er tíðar- og orkukrevjandi fyri kommunulæknarnar at koma út til viðtalur á teimum ymisku heimunum. Eisini minka skipanir við føstum kommunulæknum til ellis- og røktarheim um trýstið á akutt-móttøkuna á sjúkrahúsum.

At ellis- og røktarheimini fáa kommunulæknar fast knýttar at heimunum vildi verið ein fyrimunur fyri bæði búfólk, starvsfólk á ellis- og røktarheimum og fyri heilsuverkið.

Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýriskvinnuni í heilsumálum.

Á Løgtingi, 23. juni 2025

Kristianna Winther Poulsen